VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

Møtt: Eyðdis H. Niclasen, Rósa Samuelsen, Jonhard Joensen, Jónhard Selfoss, Dánjal Thomsen, Albert Ellefsen, Heðin Poulsen, Jens Gaardlykke, Dagbjørn Hansen og Jórun Haraldsen

Skrivari: Jóannes N. Dalsgaard

Yvirlit yvir mál til viðgerðar

Pkt.	Tekstur	Síða
40	Kommunu roknskapur 2018	1
41	Eykaætlan EXTRA19_02	2
42	Luna hevur bráfeingis tørv á nógvum vatni í sambandi við sjúkuviðgerð av alifiski	3
43	Leitisvatn, riva í kantin úti í Oyrum	5

2019-11-2

40. Kommunu roknskapur 2018

Málsfrágreiðing

Roknskapurin fyri 2018, vísir eitt RLÚ uppá -7.950 mkr.(yvirskot), og eina útjavningarkonto uppá 36.305 mkr. pr. 31.12.2018
Rakstrarútreiðslurnar eru 76.784 mkr., sum er 6.5 mkr. meira enn í 2017. Løgurnar eru 13.024 mkr., sum er 8.3 mkr. meira enn í 2017

Tilmæli 9. maj 2019, pkt. 38:
Umsitingin mælir til at viðmæla at roknskapurin verður samtyktur

Fíggjarnevnd, 9. maj 2019, pkt. 38:
Viðmælt.

Avgerð

Formansváttan

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

Samtykt at góðkenna roknskapin.

Skjøl

- 2.3 Kontoskema - Fíggjarnevnd 2018
- Uppskot RO2018.583.pdf
- Uppskot til P2018.13583.pdf
- Uppskot LV2018.13583.pdf

2019-11-3

41. Eykaætlan EXTRA19_02

Málsfrágreiðing

1. viðgerð av eykaætlan EXTRA19_02

Í samband við kloakkina við "Kongsgil" í Sandavági, verður neyðugt at játta meira pening.
Mælt verður til at játtanin til RS62400 (Kloakkir rakstur) verður hækkað við kr. 700.000,-

Mælt verður til at játtanin til RS62210 (Vatnveiting rakstur) verður hækkað við kr. 250.000,-

Mælt verður til at játtanin til RS114 (Umsitingin) verður hækka við kr. 100.000,- Upphæddin skal markast til konto 1479 keyp av tænastum Útgr. K-SKEIÐ

Tilmæli 9. maj 2019, pkt. 39:
Umsitingin mælir til at taka undir við eykaætlanini.

Fíggjarnevnd, 9. maj 2019, pkt. 39:
Viðmælt.

Avgerð

Samtykt við 1. viðgerð.

Skjøl

Formansváttan

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

- 2.3 Kontoskema - Fíggjarnevnd 2019
- EXTRA19_02 09-05-19

2019-51-7

42. Luna hevur bráfeingis tørv á nógvum vatni í sambandi við sjúkuviðgerð av alifiski

Málsfrágreiðing

Táknusjúkan AGD hjá laksi byrjað at gera um seg í Føroyum. Luna hevði stórar trupulleikar av hesu sjúku á Miðvági/Sandavági í fjørð heyst. Sjúkan kann basast við at baða laksin í feskvatni. Tað krevur, at Luna fær atgongd til nógv feskvatn. Luna ætlar at leggja tveir aliringar við feskvatnspresending, ið rúma 6.000 tons av vatni hvør, innanfyri brimgarðin. Roknað verður við einum minimumstørvi uppá 1.500 tons um døgnið, harav Kommunan kann lata 500 tons um døgnið. Um Kommunan í framtíðini kann lata meira vatn, Ynskja tey fegin at taka ímóti hesum. Meira vatnmongd tey fáa atgongd til, betri verður viðgerðin.

Luna søkir Kommununa um loyvi, tá ið tørvur er á tí, at brúka avlopsvatnið frá kommununi og at taka vatn úr Hóssá við vegin omanfyri bátahylin. Har er ætlanin at leggja eitt 200 mm rør frá bátahylinum eftir botninum út ímóti brimgarðinum. Beint innanfyri brimgarðin, út fyri har, sum tey hava tøkuvirksemi, ætla tey at hava feskvatnsringarnar liggjandi í samband við viðgerðirnar.

Tað verður ikki tørvur á at pumpa vatnið.

Niðanfyri er víst, hvussu tey ætla at leggja rørið, frá Hóssá eftir botninum út til feskvatnsringarnar innanfyri brimgarðin. Tey meta ikki, tað kemur at órógva skipaferðsluna í havnini, ei heldur ferðsluna í bátahylinum.

Formansváttan

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

Vinnu- og Havnanevndin, 7. maj 2019, pkt. 6:
Viðmælt.

Tekniska nevnd, 8. maj 2019, pkt. 60:
Viðmælt

Avgerð

Samtykt at geva loyvi, treyta av at bátaferðslan ikki verður tarnað.

Rør skal leggjast og inntak í Hóssá gerast í samráð við kommununa.

Skjøl

- Frásøgn frá fundi um bráfeingis tørv á nógvum vatni
- Kort yvir plasering av leiðing og ringum
- Skriv frá Luna um feskvatnsveiting í Miðvági

Formansvattan

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

2018-47-17

43. Leitisvatn, riva í kantin úti í Oyrum

Málsfrágreiðing

Dagbjørn Hansen er blivin gjørdur varugur við møguligan trupulleika við lendinum úti í Oyrum, sum kann hava ávirkan á Leitisvatn og vatnstandin har.
Fyrispurningur er sendur til Sørvágs kommunu, tí rivan í lendinum er innanfyri økið hjá Sørvágs kommunu.
Vága kommuna hevur ikki beinleiðis myndugleika á økinum. Hagaparturin á staðnum varar av økinum og tað liggur innanfyri kommunumarkið hjá Sørvágs kommunu.
Tó er talan um áhugamál hjá kommununi, tí kommunan tekur drekkivatn úr Leitisvatni.

Tilmæli 10. april 2018, pkt. 64:
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at kanna møguligar avleiðingar av málinum við umboð fyri Sørvágs kommunu.

Tekniska nevnd, 10. april 2018, pkt. 64:
Málið umrøtt.

Samskifti hevur verið við Sørvágs kommunu um málið. Erik Davidsen frá Sørvágs kommunu hevur vent sær til Jarðfeingi og spurt um teirra tilráðing. Jarðfeingi mælir til at tey gera kanningar av møguligari erosión í økinum. Mettur kostnaður av kanningunum er umleið kr. 30.000,-.

Tekniska nevnd, 8. maj 2019, pkt. 57:
Mælt verður til, at Vága kommuna verður við til at fíggja arbeiðið at gera kanningina saman við Sørvágs kommunu. Mælt verður til, at Vága kommuna rindar 50% av kanningini.
Nevndin mælir til, at tilfar verður fylt í rivuna í summar.

Fíggjarnevnd, 9. maj 2019, pkt. 42:
Taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

Avgerð

Samtykt.

Skjøl

Formansváttan

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Býráðið

Fundur nummar	Almennur fundur 6
Fundardagur	13. maj 2019 kl. 18:00
Fundarstaður	Kommunuskrivstovan í Sandavági

- Leitisvatn
- Skriv frá Jarðfeingi

Bók lisin Fundur lokin

Eyðdis H. Niclasen

Rósa Samuelsen

Jonhard Joensen

Jónhard Selfoss

Dánjal Thomsen

Albert Ellefsen

Heðin Poulsen

Jens Gaardlykke

Dagbjørn Hansen

Jórun Haraldsen

Dánial Johansen